Tórshavn 16.november 2023

Viðmerkingar frá Fakfelagssamstarvinum til ætlaðu skattaumskipanina

Til Fíggjarnevndina

Fakfelagssamstarvið takkar við hesum fyri møguleikan, at viðmerkja ætlaða uppskotið um skattaumskipan 2024 og 2025.

Tað er ein sannroynd, at dagligdagurin er vorðin alsamt truplari fíggjarliga hjá føroyska húsarhaldinum. Nú ógvuslig hækking, síðani 2020, er farin fram á rentustigi og prísum á gerandisvørum og tænastum, eru mánaðarligu útreiðslurnar hjá einari vanligari føroyskari barnafamilju[1] øktar við umleið kr 10.000 mánaðarliga. Fáar familjur megna at varðveita livistøðið, tá útreiðslurnar økjast so ógvusliga og keypiorkan soleiðis verður munandi skerd. Tískil er ein skattalætti, sum skattaumskipanin førir við sær, kærkomin. Lættin er tó sera avmarkaður hjá teimum mongu, sum veruliga hava brúk fyri einum lætta.

Broytingin í landsskattastiganum í 2024 og 2025 hevur hesar skattalættar við sær:

Ársinntøka	Mánaðarinntøka	Mánaðarligur skattalætti 2024	Mánaðarligur skattalætti 2025
100.000	8.333	29	58
140.000	11.667	62	125
160.000	13.333	79	158
180.000	15.000	96	192
200.000	16.667	96	192
220.000	18.333	96	192
240.000	20.000	117	213
260.000	21.667	200	296
280.000	23.333	283	379
300.000	25.000	283	463
320.000	26.667	283	546
340.000	28.333	325	629
360.000	30.000	408	713
380.000	31.667	492	796
400.000	33.333	492	879
420.000	35.000	492	963
440.000	36.667	492	1.046
460.000	38.333	492	1.088
500.000	41.667	492	1.088
540.000	45.000	492	1.088
580.000	48.333	492	1.088
600.000	50.000	492	1.088
620.000	51.667	492	1.004
640.000	53.333	492	921
660.000	55.000	492	838
680.000	56.667	492	754
700.000	58.333	492	671
720.000	60.000	408	588
740.000	61.667	325	504
760.000	63.333	242	421
780.000	65.000	158	338
800.000	66.667	75	254

Mynd 1: Yvirlit yvir mánaðarligan skattalætta, tengt at inntøku

[1] Húskið hevur 2 smærri børn, eina sethúsaskuld á 2,5 mió kr, lítið billán og annars vanligar útreiðslur.

Tórshavn 16.november 2023

Mynd 1, sum vísir yvirlitið yvir mánaðarligan skattalætta, tengt at inntøku, vísir greitt, hvørjar ársinntøkur fáa størsta skattalættan. Í 2024 er tað serliga ársinntøkurnar millum kr 380.000 og kr 700.000, ið fáa størsta lættan og tá landsskatturin eisini er umskipaður í 2025, er tað inntøkurnar frá kr 460.000 til kr 600.000, ið fáa størsta lættan.

Miðalløn í Føroyum liggur um kr 30.000 mánaðarliga ella kr 360.000 árliga. Sum mynd 1 vísir, fær føroyska miðalløn bert avmarkaðan skattalætta, sammett við hægru lønirnar. Mánaðarligi skattalættin hjá miðalløni verður um kr 400 í 2024 og um kr 700 í 2025.

Skattaumskipanin verður millum annað fíggjað við øktum avgjøldum á tungolju, dieselolju og bensin. Eisini verða nakrar serskipanir niðurlagaðar.

Hyggja vit aftur eftir húskinum, sum er nevnt omanfyri, so kann væntast, at hendan familjan fær øktar útreiðslur til orku á í minsta lagi kr 350 mánaðarliga. Í minsta lagi, tí hendan familjan ikki pendlar, men bert koyrir avmarkað tal av kilometrum árliga. Er talan um familju sum pendlar, økjast mánaðarligu útreiðslurnar til orku meira.

Legg eisini til merkis, at økt punktgjald á brennievni sannlíkt fer at økja um el-prísin og væntast kann eisini, at hægri orkuprísir kunnu fáa vinnulívið at leggja teirra øktu orku-útreiðslur omaná gerandisvørur og tænastur, sum longu eru dýrkaðar munandi og sum longu tyngja húsarhaldið sera nógv fíggjarliga.

Meginparturin av skattalættanum vil tí fara til øktar útreiðslur og soleiðis ikki lætta um fíggjarliga dagligdagin hjá teimum mongu.

Fakfelagssamstarvið metir tí ikki, at ætlaða skattaumskipanin er ein stórvegis hjálp hjá okkara limum, tí tað verður sera avmarkað, hvør fær betrað keypiorkuna av ætlaðu skattaumskipanini.

Tórshavn 16/11-23

Fakfelagssamstarvið